# Alt endar í brúsi av sangi, ljóði og tónleiki

**Á komandi varmakeldustevnu í Fuglafirði verður eitt norðurlendskt samtak skipað, sum fevnir um ljóð, sang og tónleik – ella: Menniskja í ævintýrum og søgnum. Listafólk og tónleikarar úr Danmark, Íslandi, Noregi og Føroyum taka hendur saman og gera eina uttandura- og innandura verkætlan, sum fer at bakkastokki fríggjadagin, 2. juli**

MENTANARTILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á varmakeldustevnu í ár verður munandi meira gjørt burtur úr á listarliga økinum enn vanligt. Orsøkin er, at í ár verða málningaframsýningin á varmakeldu og Fuglafjarðar Hornorkestur 35 ár. Í hesum sambandi er ætlanin at skipa fyri einum tiltaki, sum skal verða á norðurlendskum stigi. Tiltakið fevnir eitt nú um ljóð, sang og tónleik – ella, sum fuglfirðingar sjálvir rópa tað: Menniskja í ævintýrum og søgnum – eitt norðurlendskt samtak.



*– Ein ljóðmynd fer fram úti á fjørðinum í Fuglafirði á varmakeldustevnu í summar. Róðrarbátur kemur rógvandi inneftir vágni við einum marmennli – ella kópakonu - í skutinum, meðan ljóð og tónleikur ljóða um tann víða fjørð. Alt endar í einum brúsi av sangi, ljóði og tónleiki í Mentanarhúsinum, sigur Frits Johannesen*

### Um víðan fjørð

Frist Johannesen veit at siga, at ein ljóðmynd fer fram úti á fjørðinum, har ein róðrarbátur kemur rógvandi inneftir vágni við einum marmennli (kópakonu) í skutinum, meðan ljóð og tónleikur ljóða um tann víða fjørð.

Saxofinisturin, Mikkel Hess, situr í bátinum og blæsir í sítt ljóðføri.

Listafólk taka hendur saman og gera eina uttandura og innandura verkætlan, sum fer av bakkastokki fríggjadagin, 2. juli klokkan 19. Hetta er vikuskiftið, tá ið varmakelda er í Fuglafirði.

Frits Johannesen sigur, at ein listabólkur av Falster, sum listamenn í Fuglafirði hava samband við í listaligum ávíkum, fer at gera nakrar standmyndir, sum verða settar upp á ytra armi á bátahylinum.

### Endar í brúsi…

– Tá ið róðrarbáturin kemur at landi, fer kópakonan í land á bátabrúnni, og tá koma fleiri sjónleikarar í kópakonuhami uppí leikin. Øll fara nú dansandi inneftir bátabrúnni. Til tiltakið koma sjónleikarar úr Íslandi, Noregi og Danmark.

Fuglafjarðar Hornorkestur stendur millum standmyndirnar og spælir, og alt flytir seg nú inn í Mentanarhúsið, har trý kór – Tritonus úr Keypmannahavn, Kór Langholts kirkju úr Reykjavík og Fuglafjarðar Sangkór – fara at syngja eina kantatu, sum Alexandur Kristjansen, skald úr Fuglafirði, hevur skrivað.

Brøðurnir, Mikkel, Nicolaj og Emil Hess úr Danmark, seta tónleikin til kantatuna. Hesir eru heimskendir jasstónleikarar.

– Alt endar í einum brúsi av sangi, ljóði og tónleiki, sigur Frits.

Mikkel er saxofonistur, Nikolaj pianistur, og Emil Hess er trummusláari. Kontrabassur er eisini við, og her verður tað Edvard Nyholm Debess sum spælir

– Fleiri listaframsýningar verða bæði innan-og uttandura kring um í Fuglafirði. Hvussu hesar verða skipaðar, er ikki endaliga greitt enn, sigur Frits Johannesen.

## Kvinnur sum íbirtarar í Pakkhúsinum

**Í kvøld verður uppfylgjandi fundur av tiltakinum »Kvinnur sum íbirtarar« í Stóra Pakkhúsi í Vági**

TILTØK
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í kvøld, hóskvøldið 19. februar, skipar Suðuroyar Skeiðsdepil fyri seinna fundinum um »Kvinnur sum íbirtarar«. Fundur verður í Stóra Pakkhúsi og byrjað verður kl. 19.30. Rúna Hjelm, stigtakari, leggur fyri.

Á hesum fundi verða møguleiki fyri at leggja ítøkilig uppskot fram - og seta arbeiðsbólkar at arbeiða víðari við íbirtaraverkætlanum. Ókeypis luttøka.

Hetta er uppfylgjandi fundur, eftir at fyrsta fundurin við hesum evninum vísti seg at fáa stóra undirtøku og uppmøtingin var góð. Nú verður so tikið aftur í aftur og er ætlanin at fáa ítøkiligar ætlanir fram í ljósið og sum skilst, so er onkur, sum arbeiðir við onkrari verkætlan.

# Lomvigin í Norðurnoregi sera illa fyri

**Verndarfelagsskapir halda ikki, at norska stjórnin eigur at loyva oljuboringum í Barentshavinum, fyrr enn greitt er, hví lomvigin er so nógv minkaður**

SJÓFUGLAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Lomvigastovnurin er í sera stórari afturgond í fuglabjørgunum í Norðurnoregi. Eisini hjá fleiri øðrum sjófuglum er støðan hættislig.

Hetta vísa fleiri nýggj kanningarúrslit hjá eini altjóða kanningarskrá fyri sjófugl.

Norðmenn halda, at ein møgulig oljuvanlukka, sum rakar strondina í Finnmørkini, kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri sjófuglin, nú stovnurin frammanundan er so illa fyri.

Ein av leiðunum, sum oljuídnaðurin heldur vera sera áhugaverda, liggur bara nakrar fáar fjórðingar úr økinum, har lomvigin heldur til.

Verndarfelagsskapir halda tí ikki, at norska stjórnin eigur at loyva oljuboringum í Barentshavinum, fyrr enn greitt er, hví lomvigin er so nógv minkaður.

Ein stórur partur av sjófuglunum í Noregi halda til í landnyrðingarpartinum av Atlantshavinum.

Úrslit í 2003 frá tíðini, tá ið búfuglurin reiðrast, vísa, at sjófuglastovnurin er metlágur.

Tað er serliga lomvigin, sum hevur verið fyri stórari minking seinastu 20-40 árini.

Mælt verður til at seta í verk kanningar fyri at finna útav, hvør orsøkin er til hesa afturgongd.

Frágreiðingarnar, sum eru lagdar fram, vísa tó bæði positivar og negativar broytingar fyri sjófuglastovnin.

Lomvigin er sera illa fyri, meðan stovnurin av súlu og skarvi er í støðugum vøkstri.



*Lomvigin í Norðurnoregi hevur verið fyri stórari minking seinastu 20-40 árini. Hinvegin veksur talið av skarvi og súlu*



# Norska kvotuskipanin á vandakós

**Norskir fiskimenn kasta fisk útaftur fyri nærri einari milliard krónum árliga. Formaðurin í Fiskidaganevndini, Óli Samró, sigur at hetta er ein beinleiðis avleiðing av kvotuskipanini**

FISKIVINNA
*Jógvan Hugo Gardar*

**Oslo, Noreg:** Týskvøldið sendi norska sjónvarpið eina sending um norskar og íslendskar fiskimenn sum blaka stórar mongdir av fiski útaftur. Fiskur sum av ymsum orsøkum ikki gevur nóg góðan prís. Tað kann vera tí talan er um smáfisk ella skeiv fiskasløg.

Norskir fiskifrøðingar á Havforskningsinstituttet meta at millum 50.000 og 200.000 tons av fiski verða koyrd í havið aftur, og hesin fiskurin hevur eitt virði uppá nærri einari milliard norskum krónum árliga. Hetta svarar til eini átta prosent av tí norðmenn fiska árliga. Í hesum talinum liggur eisini fiskur sum verður oyðilagdur av troli og gørnum. Men ein fittur partur er fiskur sum ólógliga verður koyrdur út aftur tí talan er um smáfisk sum ikki gevur nóg góðan prís, ella tí hetta er hjáveiða sum báturin ikki hevur loyvið at fiska.

Stjórin á fiskivinnu- og stovnsmetingardeildini hjá Havforskningsinstituttet, Kjell Nedreås, sigur í samrøðu við Norsk Telegram Byrå at tølini eru so stór at tey eiga at ávirka komandi kvotuásetingar.

### Kreppufundur

Norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, kallaði mikumorgunin inn til kreppufundar fyri at viðgera ákærurnar og avdúkingarnar sum komu fram í sendingini.

Umboð fyri reiðaríini vilja vera við at tey ikki kenna nakað til at fiskur verður kastaður útaftur í stórum mongdum. Tíðindastjórin hjá Fiskebåtredernes Forbund, Arill Riise, sigur at um tølini passa, so skul uteir gera nakað við ólevnaðin. Hann sigur samstundis at hann ikki trýr uppá tølini, tí millum annað eru stórar mongdir av sild við. Talan er um sild sum trolararnir ikki megna at gera nakad við í samband vid at trol ella nót skrædnar av teimum stóru mongdunum. Riise vísir á at ein noyðist at skilja ímillum tað sum er gjørt við vilja og tað sum er óhapp.

Tveir roynd fiskimenn greiddu í sendingini frá hvussu teir hava verið við til at blaka út fisk sum gott kundi verið tikin til lands. Annar av teimum, tann 34 ára gamli Ben Kåre Thomassen, sigur at hann roknar við at umleið helmingurin av smáfiskinum og hjáveiðuni fer aftur í havið.

Thomassen sigur at hesin ólevnaðurin er púra vanligur, og hann hevur verið til hetta umborð á øllum bátunum hann hevur verið við. Hann er í dag við einum av trolarunum hjá Westfish-Aarsæther »Varak«, og hann váttar at hetta eisini hendir umborð á hesum trolaranum.

Fiskimálarðharrin sigur at teir nú mugu finna eina loysn fyri at sleppa burturúr hesum. Svein Ludvigsen segði týskvøldið í samrøðu við tíðindsasendingina hjá NRK at um so er at so stórar mongdir av fiski verða blakaðar útaftur sum talan er um í sendingini, so hevur norska fiskivinnan fingið óbótaligan skaða.

### Skipanin orsøkin

Formaðurin í føroysku fiskidaganevndini, Óli Samró, sigur at tað sum kom fram týskvøldið vísir at ein kvotuskipan sum tann norska hevur trupult við at tola at spurningar vera settir við til dømis útblaking av fiski.

– Sendingin prógvar at kvotuskipaninar ikki virka, tær byggja uppundir at fiskimenn noyðast finna mátar at fáa sum mest burturúr teimum tonsunum sum teir hava fingið tilluta. Fiskidagaskipanin leggur upp til at allur fiskur sum kemur í trolið ella á húkin verður hagreiddur. Kvotuskipanin leggur ikki upp til at øll veiðan skal hagreiðast uppá besta máta. Og smáfiskur gevur minni prís enn tann stóri fiskurin, tí loysir tað seg at kasta smáfiskin útaftur, sigur Óli Samró.

– Slík lógarbrot vilja fylgja eini kvotuskipanin, og eg meini at einasta gongda leið er at hava skipanir sum minna um okkara fiskidagaskipan. Men norðmenn hava ikki vilja umhugsa at nakað er galið við skipanini. Í staðin royna teir at loysa teir einstøku trupulleikarnar innan fyri somu skipan so hvørt sum teir koma, sigur Samró, og leggur afturat:

– Teir finna neyvan nakra loysn fyrrenn teir gera nakað við sjálva høvuðsskipanina.



*Óli Samró, formaður í fiskidaganevndini*

UMBOÐSRÁÐSVAL 2004



## Verið við at velja

**Í ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna**

INNKOMIN VALEVNI ERU HESI:

Árni Jakobsen, Smærugøta 19, Tórshavn
Atli Hansen, Norðragøta
Birgir Waag Høgnesen, Vestmanna
Brynhild í Jákupstovu, Tvørgøta 9, Tórshavn
Djóni Ziska, Millum Gilja 7, Hoyvík
Emil Jacobsen, Skála
Elin Heðinsdóttir Joensen, Hoyvíksv. 22a, Tórshavn
Erling Dalsgaard, Dalagøta 11, Tórshavn
Heini Lützen, Kristiansgøta 23, Hoyvík
Herman Winther, Skopun
Hervør Hergudóttir, Bøur
Ingeborg Godtfred, Garðsgøta 21, Argir
Jákup Egholm Hansen, Sandavágur
Jógvan Durhuus, Vestmanna
Jógvan L. Rasmussen, á Frælsinum 8, Tórshavn
Jóhan Mortensen, Spógvavegur 57, Tórhavn
Jona Ulrikka Nielsen, Undir Fossum 44, Klaksvík
Klæmint Olsen, Vesturgøta 14, Tórshavn
Marin í Dali, Tórsbyrgi 10, Tórshavn
Poul Johannes Joensen, Vágur
Regin Hammer, Hanusargøta 7, Tórshavn
Rói Egholm, Hagagøta 6, Argir
Ronald Poulsen, Turiðargøta 27, Tórshavn
Súni Vinther, Hvarvið 1, Tórshavn
Tummas Jacobsen, Spógvavegur 6, Tórshavn

ATKVØÐURÆTTUR

Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í felagnum síðani 1. januar 2004.

Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið er minni enn kr. 50.000,- hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar kr. 50.000,- í árligum tryggingargjaldi harafturat, fær limurin 1 atkvøðu upp til í alt 10 atkvøður.

Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

ATKVØÐUSEÐIL OG TÍÐARFREIST

Atkvøðuseðlar kunnu umbiðjast frá 18. februar 2004 til og við 2. mars 2004 á øllum deildum felagsins. Atkvøðuseðil kann umbiðjast persónliga ella við at ringja til tel 345600, senda fax til 345601 ella teldupost til tf@trygging.fo.

Neyðugt er, at viðskiftafólk, ið persónliga biðja um atkvøðuseðil á deildum felagsins, hava samleikaprógv við sær. Verður atkvøðuseðil umbiðin um tel, fax ella teldupost, er neyðugt at upplýsa um navn/navn á virki, bústað og føðingardag.

Atkvøðuseðilin skal verða latin innaftur á *Høvuðsskrivstovu* felagsins, í seinasta lagi mánadagin 8. mars.

VALÚRSLIT

Tá valúrslitið fyriliggur, verður tað almannakunngjørt í fjølmiðlunum.

Tórshavn, 18. februar 2004
Stjórnin

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

www.sansir.fo